**Heimsins størsti Aloe Vera framleiðari leitar eftir áhugaðum og ábyrgdarfullum fólki, ið ynskir at gera natúr og heilsu til sín lívsstíl.**

Vørurnar kunnu eisini seljast gjøgnum ymiskar viðgerðarstovur. Vøruskráin er spennandi og fevnir um meira enn 50 ymiskar vørur, ið allar eru 100 % økologiskar.

Hevur tú áhuga fyri einum góðum eykaarbeiði ella eyka inntøkumøguleika, er møguleikin her.

Informatiónsfundir við luttøku av Jan Morch, produktleiðara, úr Danmark, verða hildnir:
**Fríggjadagin 14. apríl kl. 19.00 í MBF Húsinum við Landavegin í Havn og**
**Leygardagin 15. apríl kl. 15.00 í Ólavstovu í Saltangará.**

Øll eru vælkomin til ein av omanfyri nevndu ókeypis informatiónsfundunum. Eisini ber til at ringja til **tel. 321309 ella mobil 212309** og boða frá ella gera eina persónliga óbindandi avtalu.

Sosialurin - 311820

**Robustar blandimaskinur**

- Tvangsblandarir 38–800 ltr.
- Blandimaskinur 130 – 180 ltr.
- Breitt úrval av stav og bjálka-vibratorum

**Fáast við el, bensin ella dieselmotori**

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

# FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT



**SAFARI TRANSPORT**

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

**Tlf. 32 22 22**




SpF Teldu Tænastan
www.tt.fo

## Hús ynskjast til leigu!

Til ein leiðandi starvsmann hjá okkum og familju hansara ynskja vit eini hús í Havn til leigu.

Best er um húsini eru stór ella í minsta lagi hava 3 sovirúm.

Langtíðarleiga t.v.s. minst 3 ár hevur áhuga okkara.

Áhugaði kunnu seta seg í samband við okkum á telefon 314650.

**P/F Poul Michelsen**

## Eykaaðalfundur í P/F Miðalberg

Boðað verður til eykaaðalfundar í P/F Miðalberg á Bakkanum í Vági tann 28. apríl kl. 16.

Skráin fyri fundin er henda:

1. Uppskot um broyting av grein 7 og grein 16 í viðtøkum felagsins, soleiðis at allir nevndarlimir verða valdir á aðalfundi í felagnum.

Uppskotið liggur frammi á skrivstovu felagsins í Vági fyri partaeigarar at gjøgnumganga.

**Nevndin**

## Ársaðalfundur í P/F Miðalberg

Boðað verður til ársaðalfund í P/F Miðalberg, Vágur, fyri roknskaparárið 1999 á Bakkanum í Vági, tann 28. apríl kl. 16.30.

Fundarskráin fyri fundin er sambært ásetingunum í grein 7 í viðtøkum felagsins fyri vanligan aðalfund.

**Nevndin**

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 60 ára gamla kvinnu við sjúkuni sclerose at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði hjá stuðlinum verður í neyvum samstarvi við kvinnuna, Almannastovuna og aðrar stuðlar.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um mánaðin, annað hvørt vikuskifti í skiftandi vaktum.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir at vera um sjúklingar.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 314822, Ragnhild Dahl ella Petru Joensen tlf. 315480 millum kl. 9–13, tó ikki mikudag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Pensjónsdeildin
Att.: Petra Joensen
Box 196
110 Tórshavn

**Føroya Sjómansskúli**
Postboks 104, FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 311749 Fax: +298 318122
e-mail: farnav@farnav.fo

## Avloysarastarv sum sjómansskúlalærari

Søkt verður eftir lærara sum avloysara til Føroya Sjómansskúla fyribils frá 1. august 2000 til 31. desember 2000 við møguleika at halda fram.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um fysiskar karmar og samstarv ímillum leiðslu, lærarar og næmingar.

**Førleikakrøv:**
- Hægstu nautisku útbúgving.
- Kunna undirvísa í náttúrlæru, el-læru, skipstøkni og enskum.
- Praktiskar royndir sum yvirmaður í útisigling.
- Hava góðar samstarvseginleikar.
- Hava góðar royndir innan teldubrúk.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er sáttmálasett millum Fíggjarmálastýrið og Fakfelag Sjómansskúlalærara.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Sjómansskúla**
Nóatún 2
Postboks 104,
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi mánadagin 1. mai 2000.

## Bókhaldshjálp

Til bókhaldið sóknast vit eftir bókhaldshjálp, sum kann byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

| | |
|---|---|
| Arbeiðstíð: | 20 tímar um vikuna |
| Arbeiðsroyndir: | Kunnleiki til bókhald er ein fyritreyt |
| Umsóknarfreist: | Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. apríl 2000. |

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Jósvein H. Olsen.

HOTEL HAFNIA

**Hotel Hafnia**
tlf. 31 32 33 lok. 523



# Konfirmatiónir pálmasunnudag

### Havnar kirkja

Ata Maria Jensen, Brøttubrekku 14
Ása úr Dímun, Trapputún 16
Birita Lilja Simonsen, Smærugøtu 16 B
Durita Hansen, Kristiansgøtu 5
Fríða Hentze Magnussen, Tórgarðsgøtu 5
Gunnvá Brockie, Børkugøtu 11
Lisa Randi í Dali, Tórsbyrgi 3
Rannvá Daisy Danielsen, Javnagøtu 5
Rannvá undir Kletti, Tórugøtu 10
Andreas Pauli Poulsen, Berjabrekku 105
Bjarni Werner Zachariassen, Kristiansgøtu 7
Brian Vang Poulsen, Birnugøtu 13
Børge Persson, Marinargøtu 22
Eli Hultgren, Brobbersgøtu 8
Hans Arni Bjarnason Thomsen, Hvítanesvegi 43
Hjalti Mohr Jacobsen, Berjabrekku 91
Kristian Gustafson, Smærugøtu 20
Peter Ritter, Fútalág 3
Rói Bjarnason Poulsen, Lützenstrøð 11
Sjúrður Simonsen, Kristiansgøtu 14
Sylvi Hansen, Millum Gilja 42
Tróndur Herason Olsen, Gróthúsvegi 11

### Vesturkirkjan

Fróði Kristiansson Dahl, Villingardalsvegi 55
Bjarni Enghamar, Landavegi 77
Emil Nolsøe Leifsson, Hetlandsvegi 3
Hallur Eyðfinnson Jacobsen, Dánjalstrøð 1
Jákup Mortensen, Faksagøtu 12
John Martin Bisp Winther, Heygsvegi 29
Jógvan Sigvald Lydersen Jacobsen, Dalagøtu 20
Jógvan Sólheim Heinesen, Niðaragøtu 7
Niels Arge Hammer, Skemmingsgøtu 20
Pauli Reinert Poulsen, Noregsvegi 11
Páll Gazet Patursson, Kirkjubø
Páll Mohr Joensen, Grønlandsvegi 49
Remi Olsen, Viðargøtu 11, Argjum
Sigtór Lützen, Syðradali
Símun Nolsø, Varðabyrgi 30
Suni Roel Joensen, Garðsgøtu 25 b, Argjum
Svenn Fuglø Jacobsen, Reyðagøtu 1
Teitur Augustinussen, Millum Gilja 149
Thor Rafnason, Noregsvegi 1
Tummas Eivin Kruse, Vesturgøtu 20
Anna Andrésen, Heiðagøtu 13, Argjum
Anna Maria Árnafjall, Velbastaðvegi 4
Fríðgerð Mirjam Stakkslíð, Fjalsgøtu 28
Rannvá H. Augustinussen, Varðabyrgi 32
Beinta Laksá, Argjavegi 57, Argjum
Bjørg Dam, Suðurstíggjur 1, Argjum

### Hósvíkar kirkja

Úr Hósvík:
Ása Hammershaimb Christiansen
Rógvi Klæmint Djurhuus Clementsen
Heri Djurhuus
Hans Petur Hansen
Herman Bogi Jatvarðsson Hermansen
Maibritt Mortensen
Elsa Maria Magnusardóttir Olsen
Úr Hvalvík:
Páll Hansen
Elisabeth Durhild Jacobsen
Jákubina Maria Jacobsen
Walther Olsen

Úr Streymnesi:
Elisa Abrahamsen
Birita Maria Joensen
Úr Saksun:
Marita Svartá
Av Langasandi
Heidi Højsted Hansen
Jóhanna Maria Hansen
Úr Tjørnuvík:
Dagmar Andreasen

### Vestmanna kirkja

Bjarni Jógvansson Durhuus
Niels Kristian Lisberg Mikkelsen
Dánial Jákup Baldur Matras Toftum
Tórunn Andreasen
Margit Durhuus
Rúna Durhuus
Maud Egholm
Annika á Heygum
Siri Joensen
Torgunn Herlufsdóttir Johansen
Emma Poulsen
Tordis Kristina á Rógvi Simonsen
øll úr Vestmanna

### Húsa kirkja

Erling J. Arntsen, Mikladalur
Louisa P. Jacobsen, Torvgøta 18, Klaksvík (Syðradalur)
Helgi Juul Petersen, Húsar
Petur Petersen,Syðradalur

### Klaksvíkar kirkja

Alvin Ellebye Andersen, undir Fossum 66, Klaksvík
Steynir F. Andreasen, Skúlavegi 9, Klaksv.
Regin Anthoniussen, Stoksoyrarvegur 43, Klaksvík
Jón Hansen, Norðoyri
Símun Heimustovu, undir Hæddini 4, Klaksvík
Eyðfinn Jacobsen, Haraldssun
Jón Jacobsen, Gravarbø, Klaksvík
Ólavur Jacobsen, á Brekku 8, Klaksvík
Bernhard Brim Joensen, Rættargøtu 7, Klaksvík
Jóhan Mikkjalsson Joensen, Garðsendi 23, Klaksvík
Magnus Joensen, undir Fossum 32, Klaksvík
Poul Nolsøe K. Linklett (Nølli), Heygavegi 54, Klaksvík
Heri S. Nolsøe, undir Brúnni 35, Klaksvík
Rógvi á Tjaldrafløtti Olsen, Uppsalagøtu 54, Klaksvík
Bjarti Ryan Petersen, Víkavegi 38, Klaksv.
Klávus Sólheyg, Nýggivegur 6, Klaksvík
Allan Gullbrandsson Tungá, undir Brúnni 42, Klaksvík
Jóannes Poulsson N. Viðbjørg, Bumshamarsvegi 30, Klaksvík
Biretha V. Joensen, undir Hálsi 57, Klaksvík
Sunnvør Olsen, undir Hálsi 7, Klaksvík
Ågot P. Sivertsen, Uppsalagøtu 13, Klaksvík
Maria Kristina Smith, Bøgøtu 15, Klaksvík
Óluva Venned, Skúlavegi 15, Klaksvík

## Minningarorð um okkara elskaða bróður
# Jan Sofusarson á Toftini,
### Syðrugøtu



Tann 9. november 1999 var nokk tann dagurin, vit seinast koma at gloyma. Boðini um, at tú góði Jan, vart farin frá okkum vóru so óverulig, at vit enn ikki hava fatað tað heilt.

Tú vart nakað heilt fyri teg sjálvan, og tað halda vit, at nógv kunnu geva okkum rætt í. Tú sást bara alt tað góða í øllum menniskjum - so góður við øll vart tú.

Tú hevði eitt stævið lív her á fold - bleiv sjúkur longu sum hálvtannað ára gamal av epilepsi. Tú hevur brúkt nógv av tínari tíð á sjúkrahúsi, bæði her í Føroyum og í Danmark. Ongantíð hava vit kent ein persón, sum var líka tolin og fysiskt sterkur, sum tú, góði Jan. Tú ynskti altíð at blíva frískur, men visti kanska innast inni, at hetta nokk ongantíð fór at verða veruleiki.

Tú vart ein sonn bygdamenn í Gøtu. Eg trúgvi ikki, at tað var eitt mansbarn, sum iki visti hvør Jan var. Hetta kundi ein eisini staðfesta, tá ein fylgdi tær ta seinastu ferðina - umleið eini 500 fólk. Øll vóru góð við teg, tí tú vart góður við øll.

Tú gekst inn í næstan hvørt hús í bygdini fyri at fáa eitt prát, og kanska ein kopp av kaffi afturvið.

Tað vísti seg at vera líkamikið, hvønn, tú tosaði við. Tú vart bara á bylgjulongd við øll.

Í 1995 misti tú tín elsta bróður, Ólav, bert 45 ára gamlan. Hetta tók tú ógvuliga nær, tí tit vóru so tætt knýttir, og tað var nokk tann persónurin, sum tú sást mest upp til. Tú tosaði so oftani um, hvussu tær longdist eftir honum. Tað var hann, sum tók sær so nógv av tær, tá tú vart í Danmark. Í dag er tað ørðvísi - tit eru nú saman við Harranum, har eingin sjúka og pína er.

Tú vart eisini so otrúliga nógv knýttur at foreldrum okkara, og spurdi tey javnan, um tað ikki mundi vera gott í himlinum - tí har var eingin sjúka, og har høvdu øll tað gott. Tú hevði eina einfalda og sterka trúgv, sum tú heldur ikki skammaðist at siga frá.

Tú búði heima hjá mammu og pápa í øll tey 33 árini, tær vórðu givin her á fold, og tey hava verið her fyri tær altíð. Tit vóru saman altíð, og so satt sum okkara 94 ára gamli granni skrivaði til foreldrini eftir deyðsboðini:

»Góða Magnhild og Sofus - Eg luttaki í tykkara sorg, tit hava mist tykkara kelibarn, sum kravdi umsorg, men ikki gjørdi tykkum sorg.«

Saknurin eftir teg er so ómetaliga stórur - serliga fyri mammu og pápa, men tann einasta troystin fyri okkum øllum er, at tú í dag hevur tað gott.

Ærað veri minnið um elskaða bróður okkara, Jan.

**Systkini**

## Minningarorð um
# Georg Kjærbo, Sumba

Tað kom sera dátt við, tá vit leygardagin 18. mars vórðu uppringd úr Sumba og sagt varð, at pabbaba var deyður. Hann fór frískur í song um kvøldið og longu morgunin eftir var hann deyður. Pabbaba varð føddur í Sumba og har búði hann heila sítt lív. Hann var til sjós í fleiri ár, bæði við føroyskum og útlendskum skipum. Men tey seinastu árini smíðaði hann. Pabbaba hevði sera gott handalag og tað var ikki so fáar ferðir vit sendu boð eftir honum, tá okkurt skuldi gerast við hamara. Og stuttligt var at hava hann her, sera lættur av lyndi og visti nógv at siga frá. Ja, mangan sótu vit í skellilátri, tá vit vóru saman. Serliga minnast vit jólakvøldini, hann var í Vági og vitjaði og tað vikuskiftið, vit høvdu saman í Sumba seinasta summar. Tað verður eitt stórt tómrúm at koma til Sumbiar og hann ikki er har meira. Ikki inni Eystan Á og ikki minst fara vit at sakna hann, tá ið vit koma suður á Krossin, tí eitt var vist, at var nakar sumbingur uppi á Krossi, so var hann har. Tá vit komu suður á Krossin vóru børnini, sum hann var abbabeiggi at, skjót at hyggja um abbaba var komin, tí so vistu tey, at hann fór í lumman eftir einum oyra at geva teimum. Tað fyrsta børnini spurdu um, tá ið tey hoyrdu at abbaba í Sumba var deyður, var um tey nú onga krónu fingu meira, tá ið tey komu til Sumbiar. Pabbaba var so sera góður við øll børn, og hann var gávumildur sum fáur.

Góðu Andrew, Torleif, Maybritt, Marlon, Georg og Miriam, tað er ein stórur saknur hjá tykkum, nú bæði foreldrini eru farin, men Harrin styrki tykkum í sorgini.

Vit vilja við hesum orðum lýsa frið yvir minnið um okkara góða pápabeiggja, Georg Kjærbo.

**Eyðun, Eydis og Janus**

